

*Í gjár læt fiskavirkið í Saltangará uppaftur*

# Svartskygni er nú vent til bjartskygni

**BJARTSKYGNI – Líka so dapur, sum fríggjadagurin hin 4. desember var í fjør – líka bjartur var týsdagurin í gjár – hin 8. mars. Jú, lagið á fólki er gott, og tey eru fegin um at vera komin aftur til arbeiðis, sigur Jens Pauli Petersen, sum er settur virkisleiðari á fiskavirkinum í Saltangará**

Vilmund Jacobsen

Í gjár byrjaðu tey aftur at virka fisk á fiskavirkinum í Saltangará, sum hevur ligið stilt, síðan Faroe Seafood fór av knóranum hin 4. desember í fjør.

Tað er partafelagið frá 16. februar 2011, sum Varðin, Bacalao, Framherji og Samherji eiga, ið nú hevur latið virkið uppaftur.

Hesin nýggi risin í føroyskum vinnulívi keypti seks trolarar og fýra virkir, og týsmorgunin læt so fyrsta virkið uppaftur.

Felagið hevur áður sagt, at ætlanin er í fyrsta lagi at lata upsavirkið í Saltangará og saltfiskavirkið á Toftum uppaftur.

Júst, nær virkið á Toftum kemur í gongd aftur, er ikki heilt greitt enn, men sum skilst gongur neyvan long tíð, áðrenn gongd kemur á aftur virksemið á Toftum eisini.

## Arbeiða upsa

Tað eru nakrir dagar, síðan tey seks skipini hjá samtakinum, Bakur, Stelkur, Heykur, Falkur, Rókur og Lerkur, fóru til fiskiskap aftur.

Jens Pauli Petersen, sum býr í Hoyvík, er settur virkisleiðari á virkinum í Saltangará, og sum skilst kemur hann eisini at hava um hendi dagligu leiðsluna av saltfiskavirkinum á Toftum. Hann hevur áður starvast á virkinum hjá Faroe Seafood í Havn.

Hann sigur, at fyrsta lastin, sum tey fóru undir at arbeiða á virkinum í Saltangará í gjár, er komin frá partrolarunum, Róki og Lerki, sum landaðu sunnudagin.

– Skipini høvdu umleið 150 tons av upsa og nakað av øðrum fiski, sum onnur virki keyptu. Upsin, sum nú verður arbeiddur á virkinum hjá okkum, verður í stóran mun skorin til flak, pakkaður og frystur. Eisini verða nakrar skornir, sum verða pakkaðir og frystir.

> **Skipini høvdu umleið 150 tons av upsa og nakað av øðrum fiski, sum onnur virki keyptu**
>
> JENS PAULI PETERSEN

Jens Pauli sigur, at ætlanin er, at ein partur av veiðini, sum tey seks skipini koma við, verður virkaður og útfluttur sum fesk upsafløk, men tá er sjálvandi neyðugt, at leveringin av ráfiskinum og framleiðslan á virkinum verður tilpassað teimum útflutningsmøguleikum, sum eru við feskum fiski.

## Bjartur dagur

Virkisleiðarin sigur, at nógv av teimum, sum eru byrjaði aftur á virkinum í Saltangará, hava arbeitt á virkinum áður, men onkur, sum arbeiddi á virkinum hjá Faroe Seafood í Havn, arbeiðir nú í Saltangará.

Jens Pauli sigur, at í gjár vóru eini 50 fólk til arbeiðis á fiskavirkinum í Saltangará, men talið verður størri, tá alt er komið upp at koyra við fullari megi.

Spurdur, hvussu lagið var á fólki í gjár, nú fyrstu arbeiðsdagur var aftur eftir tríggjar mánaðar langa steðgin, heldur virkisleiðarin fyri, at líka so dapur, sum hin 4. desember var í fjør – líka bjartur var dagurin í gjár – hin 8. mars.

– Jú, lagið á fólki er gott, og tey eru fegin um at vera komin aftur til arbeiðis, sigur Jens Pauli Petersen.